# Óvist um nýggi Smyril fer at sigla fleiri túrar

**Fyribils arbeiðir Strandferðslan við eini ætlan um, at nýggi Smyril skal sigla sama túratal, sum hesin ger**



*– Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, vinstrumegin, tí djúpari samtalu við samfelagsfrøðingarnar Bjarna Mortensen, í miðjuni og Dennis Holm um nýggja Smyril, ferðaætlan og strandferðslu*

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ikki vist, at nýggi Smyril kemur at sigla fleiri túrar, enn hesin.

Tað fingu suðuroyingar at vita frá stjóranum á Strandferðsluni á evnisdegnum seinasta leygardag um samferðsluviðurskiftini í Suðuroy.

Kristian Davidsen segði, at nú Strandferðslan er farin at leggja ætlanina fyri næsta ár, verður fyribils arbeitt út frá tí, at nýggi Smyril skal sigla sama túratal, sum hesin ger.

Kortini leggur hann afturat, at í hesum sambandi er verri enn so síðsta orðið sagt enn, tí teir komandu mánaðirnar skal støðan viðgerast.

Kristian Davidsen sigur, at nýggi Smyril siglur so mikið skjótari enn hesin, at skal hann sigla sama túratal um vikuna, verður siglingstíðin einar 14 tímar færri.

– Sostatt leypa 14 tímar av og tað gevur rúmd fyri 3-4 túrum afturat um vikuna, uttan at sprongja sáttmálasetta tímatalið hjá manningini og reglar um hvílitíð o.s.fr.

Hinvegin verða eyka útreiðslur til olju og annað, so tað er óvist, hvussu verður.

Í Sosialinum í gjár segði Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, sum yvirtekur Strandferðsluna tann 5. juli, at sum búskaparligu útlitini eru, dugir hann illa at síggja, at játtanin til Strandferðsluna verður hækkað.

## Skal brúkast

Á evnisdegnum vísti Dennis Holm, samfelagsfrøðingur á, at tað er høpisleyst at byggja eitt skip fyri 300 milliónir, sum bara skal sigla í seks tímar um samdøgurið.

– Tað vildi svara til, at undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi einans var opin seks tímar um samdøgurið og tað duga øll at síggja at tað hevði verið burturvið.

Kristian Davidsen sigur, at teir hava ongan áhuga í at liggja á nýggja Smyrli, tí hann skal er sjálvandi bygdur til at brúka.

Hinvegin ivast hann í, hvussu breitt Strandferðslan skal fevna um.

Hann heldur, at Strandferðslan skal miðsavna seg um at flyta ferðafólk ímillum oyggjarnar og at leggja eina so góða ferðaætlan sum gjørligt.

– At gera serligar útferðir, liggur uttanfyri vanliga virkisøkið hjá Strandferðsluni.

Tí er hann ikki treytaleyst hugaður fyri at taka undir við hugskotinum um at gera serliga ferðir kring Suðuroynna ella midnáttarferðir undir Enniberg, sum uppskot er sett fram um.

Tí heldur hann, at skal Smyril gera serligar ferðir, skal hann leigast til tað.

Somuleiðis heldur hann at tað vildi verið skeivt at farið undir matstovu- og hotellvirksemi sum so umborð á Smyrli, tí tað vildi verið at tikið kappingina upp við tey privatu vinnurekandi á økinum, men tað merkir sjálvsagt ikki, at matstovan umborð ikki verður opin, tá ið siglt verður.

# Best at einskilja Strandferðsluna

**– Tað hevði verið eitt gott hugskot at lagt Strandferðsluna í eitt alment partafelag, heldur stjórin á Strandferðsluni. Men at luta hana sundur í fleiri feløg, tekur hann ikki undir við**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Kristian Davidsen greiðir suðuroyingum frá um Strandferðsluna og nýggja Smyril á evnisdegi í Øravík seinasta leygardag*

– Tað besta hevði verið at einskilt Strandferðsluna og at lagt hana í eitt partafelag. Tað heldur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Á evnisdegnum í Suðuroy seinasta leygardag um samferðsluviðurskiftini í Suðuroy, vísti stjórin á Strandferðsluni á, at í nógvum londum rundanum okkum hevur tað hepnast væl at lagt flutningsskervið í almenn partafeløg.

– Í øllum londum rundanum okkum, verður hugsað í feløgum, heldur enn í stovnum.

Kristian Davidsen sigur, at verður Strandferðslan skipað í eitt felag, hevði greiður skilnaður verðið gjørdur ímillum hana og politiska myndugleikan.

– Tað, sum lonnur lond hava gjørt, er síðani at gera ein samferðslusáttmála í millum flutningsfelagið og politiska myndugleikan.

– Í hesum sáttmála er greitt sett upp, hvørja tænastu, flutningsfelagið skal røkja og hvussu nógv, tað skal hava afturfyri frá landskassanum.

Innanfyri teir karmarnir, sum eru ásettir í samferðslusáttmálanum, kemur Strandferðslan so at hava fríar ræsur.

– Sostatt binda báðir partar seg til at at halda heilt ávísar skyldur mótvegis hvørjum øðrum og tað hevði verið ein nógv greiðari skipan, enn vit hava nú.

## Greiður skilnaður

Kristian Davidsen sigur, at varð tað gjørt, hevði Strandferðslan verðið rikin sum eitt privat virki við ávísum, greiðum skyldum. Hann sigur, at hetta hevði verið ein stórur fyrimunur, bæði fyri politiska myndugleikan, fyri Strandferðsluna og fyri viðskiftafólkið hjá Strandferðsluni.

– Fyri politiska myndugleikan hevði fyrimunurin verið, at viðurskiftini verða púra greið. Men tá ið Strandferðslan fær heilt greiðar karmar at halda seg til, hevði politiski myndugleikin eisini sloppið undan afturvendandi trupulleikanum við eykajáttanum.

Tað er heldur ongin loyna, at tað er ovurstórur, politiskur áhugi fyri hvørjum einasta túri, sum Strandferðslan siglur.

Men verður hon løgd í eitt partafelag, hevði hon eisini sloppið undan politiskari uppílegging í allar møguligar smálutir.

Ella sum strandferslustjórin orðar tað:

– Í øllum førum fáa vit skorið ein greiðan karm til hjá báðum pørtum!

## Skeivt at luta sundur

Hinvegin tekur stjórin á Strandferðsluni ikki undir við samferðslubólkinum í Suðuroy, tá ið hann mælir til at taka Smyril burturúr Strandferðsluni og at leggja hann í P/F Suðuroyarleiðina.

– Tað er skeivt at luta Strandferðsluna sundur í fleiri eindir, segði Kristian Davidsen á evnisdegnum. Hann sigur, at tað eru ymsar tvørgangandi funktiónir á Strandferðsluni, sum ein slík fyritøka má hava, um hon so hevur eitt skip, ella um hon hevur 10 skip.

Hann sipar m.a til rakstrardeildina, sum umsitur manningarviðurskifti, útreiðslustýring o.s.fr.

– Verða einstøk skip tikin burturúr Strandferðsluni, hevði tað sostatt gjørt raksturin dýrari.

*Men hví so ikki leggja alla Strandferðsluna í Suðuroy?*

– Tað er eitt ynski, sum er væl skilji. Tað hevði helst eisini bæði verðið betri fyri suðuroyingar og fyri Smyril.

Hinvegin hevði tað verið verri fyri øll hini skipini, tí so kemur umsitingin at liggja longri burturfrá skipunum og tað fer at føra til øktar útreiðslur, eitt nú í sambandi við ferðing.

– Alt legur seg gera, men at flyta ein heilan stovn er eitt sera stórt stig. Tað hevði kostað nógv at bygt Strandferðsluna upp av nýggjum í Suðuroy. Hinvegin er tað bíligari at leiga høli í Suðuroy og í ávísan mun er lønarlagið eisini lægri í Suðuroy.

Men hann heldur, at tað er ilt at siga, um tað samanumtikið hevði verðið dýrari í longdini at rikið Strandferðsluna úr Suðuroy.

## Hovmeistari setast

Í prátinum um einskiljing á Strandferðsluni, hevur tað eisini verðið nevnt, at tað rætta hevði verið at einskilt kiosk- og matstovuvirksemið umborð á Smyrli og at leiga tað út til onkran privatan vinnurekandi.

Tað er ikki ein ætlan, sum verður umhugsaður.

– Tað, sum liggur í kortunum nú, er at ein hovmeistari skal setast av hava ábyrgdina av matstovu- og kioskvirkseminum umborð, sigur Kristian Davidsen.



# Koyristólur eingin forðing

**Tær fýra, sum reka handarbeiðs- og ítrivsbúðina, Diana, í Saltangará, seta tey rørslutarnaðu í hásætið. Sum eitt tað fyrsta, tá handilin flutti úr Lamba út í Saltangará, settu tær sær fyri, at tað skuldi verða møguligt hjá teimum í koyristóli at handla hjá teimum**

HANDILSUMSTØÐUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Hóast tú ert bundin at koyristóli, er einki til hindurs fyri, at tú kanst handla í handarbeiðs- og ítrivsbúðini hjá Dianu í Saltangará. Formaðurin í MBF, Leila Solmunde sigur, at tað vísir seg, at privatu fyritøkurnar eru skjótari at hugsa um tey rørslutarnaðu enn tað almenna*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Fyri stuttum flutti handarbeiðs- og ítrivsbúðin hjá Dianu Jacobsen í Lamba út í Saltangará. Handilin heldur til í hølunum, har Heiðabúðin fyrr var.

Fyri mongum árum síðani, byrjaði Diana at handla við meturvørum í kjallara sínum í Lamba. Handilin gekk væl, og Diana fekk við tíðini tríggjar aðrar afturat sær, sum nú reka handilin saman við henni.

Handilin liggur soleiðis fyri, at tað eru nøkur trapputrin upp til hurðina. Men tær tríggjar gjørdu av, at eisini tey rørslutarnaðu skuldu hava møguleikan at keypa í teirra handli. Tí, sum tær siga, at hóast tú ikki kanst brúka beinini, so er einki til hindurs fyri, at tú kanst gera handarbeiði.

Eisini inni í sjálvum handlinum er hugsað um, at pláss skal vera fyri koyristólum; har er rúmligt og frítt millum hillarnar.

Umframt toy í meturmáli og handarbeiðs- og ítrivslutir av ymiksum slagi, selja tær eisini seymimaskinur.

Diana hevur í mong ár starvast sum heimahjálp, og dagliga arbeiðir hon við fólki, ið eru bundin at koyristóli. Tað ger, at tað hjá henni er heilt náturligt at hugsa um tey, ið ikki kunnu nýta trappur.

Formaðurin í MBF, Leila Solmunde, fegnast um ta hugburðsbroyting, sum er at síggja, tá tað ræður um at gera tað atkomiligt hjá rørslutarnaðum

– Men tað vísir seg, at privatu fyritøkurnar eru skjótari at hugsa um tey rørslutarnaðu enn tað almenna, sigur hon.

Tað er byggivirkið, KBH á Toftum, sum hevur gjørt skráan, sum er úr træi og kostar smáar 20.000 krónur.

# Risastórt sjónleikaratiltak á ólavsøku

**Fyrireikingarnar til útileikin á ólavsøku eru byrjaðar, og nú kunnu komandi ólavsøkugestirnir byrja at gleða seg til, at havnargøtur verða broyttar til ein ævintýrkendan heim, tá umleið 100 sjónleikarar í litføgrum búnum, gyklarar og dansarar við tónleiki og dansi føra tey gjøgnum býin frá einum palli til annan**

SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*



Kærleiki er evnið og Havnin er pallurin. Nú kunnu øll, sum hava ein lítlan sjónleikara, tónleikara, fimleikara ella gyklara í maganum royna seg, tí aftur í ár verður útileikur á ólavsøku. Havnargøtur verða broyttar til ein ævintýrheim á opnum plássum og í smáum skotum, tá eini 100 sjónleikarir, fimleikarir, dansarir, statistar, hjálparfólk og tónleikarir føra ólavsøkugestirnir gjøgnum býin og inn í ein annan heim, har tey kunnu hitta alskyns verur og skapningar úr ævintýrunum.

Fyrireikarirnir vóna, at nógv melda seg til at luttaka í útileikinum, óansæð um tað er tí, at tey duga at seyma, smíða ella at spæla sjónleik - tørvur er á allari skapandi megi.

Útileikurin verður framførdur á ymsum plássum í Havn og heldur fram stað av staði.

Gongan byrjar á Bursatanga og endar í Vágsbotni við steðgi til dømis uttanfyri løgtingið og í Tróndargøtu, og áskoðarirnir kunnu sostatt fylgja við leikarunum í paraduni av gyklarum sum ganga á styltum og dansarum sum saman við tónleikarum og leikarum siga frá søgum um kærleika og lagnunar speisemi.

## Vóna at nógv melda seg

Útileikurin á ólavsøku er siður, sum tók seg upp fyrst í nítiárunum, og er hetta tann fjóri. Fyrireikingarnar eru byrjaðar, og nú hava fólk so møguleika at melda seg, um tey vilja vera við í tiltakinum.

Fyrsta venjing verður sunnudagin 20. juni kl. 14 á Føroya Fólkaháskúla, og øll áhugaði kunnu møta. Tey, sum sum ikki hava stundir at venja so nógv, kunnu melda seg sum statistar, tí tann venjingin er ikki so umfatandi.

Umframt leikarar og statistar sóknast fyrireikarnir eftir handverkarum og fólki, sum duga at seyma. Eigur onkur ein gamlan brúðarkjóla, stores ella okkurt annað stórt toyðpetti, sum tey vilja lata, er tað eisini kærkomið.

Marita Dalsgaard hevur listarligu leiðsluna av tiltakinum í ár, eins og hon virkar sum leikstjóri saman við Katarinu Nolsøe, Elini á Rógvu og Annfinni Heinesen. Jóna Thomsen tekur sær av koreografi og dansi, og Trygvi í Brekkunum samskipar tónleikin. Aldursmark fyri luttøku er sett niður í 15 ár - og uppeftur er einki mark.

Tey sum hava áhuga í tiltakinum kunnu venda sær til MáF, Meginfelag áhugaleikara Føroya, ella møta á fyrsta fundinum á Háskúlanum sunnudagin 20. juni kl. 14.